## Vápnini eru trygg

Um vikuskiftið eydnaðiswt tað Taliban at leypa á høvuðsstøðina hjá pakistanska stjórnarherinum, og álopið fekk fleiri politiskar eygleiðarar at spyrja, hvussu trygg tey pakistonsku kjarnorkuvápnini eru. Men amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, vissar altjóða samfelagið um, at eingin vandi er á ferð. Á einum tíðindafundi í London í gjár segði hon seg hava fult álit á pakistonsku stjórnini, og at pakistanska herleiðslan hevur ræði á landsins kjarnorkuvápnum.



## Oljuprísurin hækkar

Triðja dagin á rað hækkaði oljuprísurin á altjóða marknaðinum í dag. Orsøkin er søgd at vera veksandi eftirspurningur, og at heimsbúskapurin er um at fóta sær aftan á ta stóru fíggjarkreppuna. Tað skrivar Bloomberg News. Sum tekin um bata í heimsbúskapinum nevnir tíðindastovan, at stjórnin í Singapore hevur kunngjørt, at hon væntar eitt betri búskaparligt úrslit í ár enn higartil hildið. Ein tunna av ráolju, sum skal latast í næsta mánaði, kostaði í morgun 71,38 dollarar á altjóða marknaðinum, skrivar Bloomberg News.

# Størsta fráflyting síðan kreppuna

**Í august mánaði, sum vanliga er tann størsti fráflytingarmánaðin, fluttu heili 595 fólk av landinum. Nettofráflytingin er tann størsta síðan kreppuárini**

FÓLKAFLYTING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*- Føroyingar stinga í sekkin. Ógvuslig fráflyting var í august mánaði, tann størsta síðan kreppuna (savnsmynd)*

Ógvuslig fráflyting var í august mánaði. Hesin mánaðin er vanliga tann mánaðin á árinum, har flest fólk flyta av landinum, men í ár eru serliga nógv farin av landinum.

Í august mánaði fluttu 595 fólk av landinum, meðan 189 fólk fluttu til landið. Hetta er ein nettofráflyting á 406 fólk.

Hetta er tann størsta fráflytingin síðan kreppuárini frá 1992 – 1994, tá nettofráflytingin var ávikavist 472, 595 og 640 fólk, og tann fjórðstørsta nettofráflytingin, sum er skrásett.

Síðan 2006 hevur talið ligið millum 232 og 261.

Harafturat var burðaravlopið negativt við fimm fólkum. Tað vil siga at tað vóru fimm fleiri deyð, enn tað vóru fødd. Hetta er aðru ferð síðan fýrsini, at burðaravlopið hevur verið negativt í einum mánaði, fyrstu ferð var í januar 1999, tá tað var negativt við einum.

Sostatt minkaði fólkatalið við 411 fólkum í august 2009, og tann 1.september búðu 48.603 fólk í landinum, sum er 132 færri enn á nýggjárinum, tá vit vóru 48.753 fólk í landinum.

Burðaravlopið frá nýggjárinum til 1. september er 136 fólk.

## Pætur og úlvurin við fløgu




*Nú ber til at lurta eftir tónlistaævintýrinum um »Pætur og úlvin« á fløguspælaranum, meðan tú blaðar í bókini við vøkru myndunum*

Klassiska tónlistaævintýrið um *Pætur og úlvin* er nú aftur at fáa - hesuferð við fløgu.

Síðini 1992 hevur bókin um Pætur og úlvin verið at fingið saman við kasettubandi. Men av tí at ongin nýtir kassettubond longur, hevur leingið verið ætlað at geva bókina út við fløgu.

*Pætur og úlvurin* er eitt tónlistaævintýr, har øll menniskju og djór verða myndað av ymiskum ljóðførum. Til dømis myndar ein floyta fuglin, ein fagott abban, ein klarinett er kettan og so framvegis. Á henda hátt lærir barnið orkersturtónleik, samstundis sum tað lærir at skyna á ymisku ljóðførunum. Eisini fylgja vøkru myndirnar í bókini við tónleikinum á fløguni.

Verkið Pætur og úlvurin er kent um allan heim, bæði sum ballett, sjónleikur og filmur.

Tað er Serge Prokofiev, sum hevur skrivða tónlistaævintýrið. Jörg Müller hevur teknað myndirnar, og Bjørg Matras týddi til føroyskt

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út bókina og fløguna um *Pætur og úlvin.*

**-ave-**

# Korndalsbýlið 10 ár



Korndalsbýlið á Eiði er eldrasambýli, og ætlað eldri borgarum, sum á einhvønn hátt ikki longur megna gerandisdagin heima.

Málið hjá býlinum er:

*– at skapa tryggleika og trivna í heimligum umhvørvi*
*– at stuðla búfólki til størst møguligt sjálvbjargni*

Korndalsbýlið er kommunalt eldrasambýli við plássi til 15 búfólk. Heimið varð bygt í 1999 og hevði tá pláss til 10 búfólk. Í 2004 bleiv kjallarahæddin innrættað soleiðis, at tað í dag er pláss fyri 15 búfólkum, harav eitt pláss verður nýtt til umlætting.

Tað er heimarøktin, sum saman við Eiðis kommunu umsitur sambýlið.

Á Korndalsbýlinum starvast heilsurøktarar, heilsu- og heimahjálparar og eitt køksrøktarsólk. Sjúkrarøktarfrøðingur starvast sum deildarleiðari og tekur sær av sjúkrarøktarspurningum.

Í vikuskiftunum kemur sjúkrarøktarfrøðingur úti í økinum inn á sambýlið um tørvur er á tí.

Á Korndalsbýlinum siga búfólkini seg at trívast væl, og tey eru glað fyri at sambýlið er í bygdini soleiðis, at tey kunnu verða verandi í bygdini, nú tey eru komin so mikið til alders, og av ymiskum orsøkum ikki megna at vera heima hjá sær sjálvum longur.

Tað er ymiskt á skránni hjá búfólkunum gjøgnum vikuna. Tvær ferðir um vikuna gera tey fimleik saman við fysio- og ergoterapeutunum, ein dag um vikuna hava tey eldru vitjan av nøkrum fittum barnagørðum, sum koma at heilsa upp á »ommurnar og abbarnar«, og hava tey eina hugnaliga løtu saman. Andakt verður hildin fyrsta og triðja mánakvøld í hvørjum mánað, har skiftivís prestur og Brøðurnir stíla fyri.

Annars fáast nøkur konufólk við at binda ella brodera, ella bara sita og práta, meðan tað er dagligur kostur hjá summum av monnunum at fara í »undirhúsið«, har dúgliga verður prátað.

Korndalsbýið liggur væl fyri mitt í bygdini soleiðis, at tað er lætt atkomiligt hjá gestum at koma fram við og eisini dámar búfólkunum at fara ein túr inn ímillum.

8. september í ár vóru 10 ár liðin, síðani fyrsta búfólkið flutti inn at búgva, og í hesum sambandi verður almenn móttøka á Korndalsbýlinum leygardagin 17. oktober millum klokkan 15 og 17.